# 2004

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR



# ÍF – B36

**LANDSKAPPING**

**Sunnudagin 26. september 2004 Kl. 15.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

TOYOTA MIKLAGARÐUR P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 9 2004**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Rógvi Róin
Álvur Haraldsen/
Sosialurin

**Kápumynd**
Magni á Lakjuni stríðist um bóltin við Arnbjørn Danielsen úr B36 í dystinum í Gundadali
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

TAÐ HALDA VIT

# Eitt buldrasligt kappingarár

Nú vit leika síðsta heimadyst í ár, mugu vit ásanna, at tað hevur verið heldur buldrasligt higartil, og tað verður tað nokk eisini teir báðar dystirnar, sum eftir eru. Vit vóna tó, at avgerðin fellur í dag – til okkara fyrimun sjálvandi - so kunnu okkara menn fara at fyrireika seg at spæla ímóti nr. 2 í 2. deild, og aftaná tað vónandi eisini til komandi kappingarár.

Vónirnar og upptaktin til landskappingina var góð. Vit høvdu fingið fatur á nøkrum leikarum, sum høvdu royndir frá 1. deildarfótbólti og skuldu hesir styrkja um hópin. Tað hava teir eisini gjørt, men leikliga gongdin hevur ikki staðið í mát við vónirnar og góðu úrslitini í steypakappingini. Vit hava mest sum alt landskappingarárið ligið við einum ávísum likamsluti í vatnskorpuni, og hevur hetta verið tyngjandi, bæði fyri leikarar, venjara, ÍF-nevnd og okkum í ÍF stuðlum.

Seinasta tíðin hevur nokk verið tann tyngsta hjá okkum øllum, eisini tykkum áskoðarum. Vit fingu eina góða frástøðu frá B68, sum lá – og framvegis liggur – niðast í kappingini, og tað gekk rímuliga væl á vøllinum eisini. Men so steðgaði aftur upp. Vit mistu sigurin ímóti GÍ, mistu stig ímóti EB/Streymi og síðsta vikuskiftið ímóti B68. Samstundis hava toftamenn víst, at teir, sjálvt um døpur útlit, ikki hava slept vónini. Og tað hevur givið úrslit, tí nú eru teir bara 3 stig aftanfyri okkum. Sjálvt um teir eru trý stig aftanfyri okkum, hava teir tann fyrimun, at skuldi tað hent seg, at vit endaðu kappingina við sama stigatali, so telja innanhýsis dystirnir okkara millum, og her hava teir fyrimun, tí teir vunnu á Toftum. Tað merkir, at skulu vit sjálvir avgera okkara lagnu, skulu vit hava í minsta lagi 4 stig í teimum báðum dystunum, sum eftir eru.

Tí seta vit øll okkara álit á tykkum og vóna, at tit í dag og komandi leygardag í Klaksvík fara á vøllin og veruliga vísa, at tit vilja vinna og harvið samstundis vísa, at tit hoyra heima í bestu deildini. Vælkomin til dyst í Fuglafirði í dag. Góðan dyst, og koyr á ÍF!!



DYSTURIN Í DAG

# Vit kunnu avgera alt sjálvir

Í toppinum hevur landskappingin í ár ikki verið serliga spennandi, tí HB-liðið hevur verið somikið sannførandi, at tað hevur lítil og eingin ivi størsta partin av kappingarárinum um, at teir fóru at vinna FM-heitið. Hinvegin er og hevur spenningurin í botninum verið stórur. Ikki minst nú B68 seinastu tvey umførini hevur fingið fulla úrtøku, meðan vit bara hava fingið tað eina stigið.

Í dag vitja teir hvítu úr Havn, og hava teir framvegis nógv at spæla fyri, sjálvt um FM-heitið er farið til grannarnar norðanfyri. B36 hevur áðrenn dystin í dag 30 stig og liggur á 2. plássi, meðan Skála hevur 27 stig á 3. plássi, og tí fara havnarmenn uttan iva eftir einum sigri í dag.

Hyggja vit at hagtølunum frá 1980, so hava vit verið 11 ár í 1. deild í tíðarskeiðnum og hava tí eisini leikt 11 landskappingardystir í Fuglafirði ímóti B36. Á heimavølli eru hagtølini í okkara fyrimun. Vit hava vunnið 4 ferðir (1980, 82, 89 og 93) og somuleiðis spælt javnt 4 ferðir (88, 94, 96 og 98), meðan vit hava tapt 3 ferðir í Fuglafirði ímóti B36 (81, 97 og 99). Í dag fer Petur uttan iva at seta leikararnar serstakliga nógv upp til dystin, sum man verða ein tann mest týðandi á árinum. Tað, sum umrætt ur í dag, er at spælararnir tora. – Tora at halda uppá bóltin, tora at spæla, tora at skjóta, tora at takkla og ikki minst, tora at sparka hasa leðurkúluna í kassan.

Hjá okkum eru allir leikarar tøkir, og merkir hetta helst, at onkrir av teimum, sum byrjaðu dystin á Toftum, verða uttanfyri frá byrjan, nú Viggo er tøkur aftur eftir leikbann. Eisini er væntandi, at Gunnar byrjar inni í dag. Hetta merkir helst, at Eyðolvur, sum hevur sitið nakað á beinkinum í 2. hálvu, og Hanus helst verða á beinkinum.

Á Toftum vísti Sylla, at hann er vandamikil frammfyri málinum, men kanónin manglar eitt sindur av innstilling. Tí verður hann nokk á topp, meðan Magni fær ein frían leiklut sum hangandi, helst við Gunnar eitt vet aftanfyri. Á miðvøllinum verða Fritleif, Høgni Madsen og Z´irin, meðan Áki, Bartal, Viggo og Rúni verða í verjuni.

Tann leikarin, sum helst hevur havt størst framgongd síðstu dystirnar er Høgni Madsen. Á Toftum var hann ein av fáum, sum kundi verða nøgdur við sín innsats. Hann var allastaðni. Vann bóltin úti í síðunum, á miðvøllinum og í verjuni. Eisini spældi hann bóltin skilgott frá sær nærum hvørjaferð.

Á beinkinum verða, umframt Eyðolv og Hanus, Teitur, Sverri og Eyðun Ryggshamar. Hesir megna allir at koma inn í einum so týðandi dysti. Serliga Teitur hevur seinastu dystirnar víst, at við sínum skjótleika er hann sera vandamikil. Hann hevur ikki fingið serliga nógva spælitíð, tá hann er komin inn, men kanska velja venjararnir í dag, at seta hann inn fyrr í dystinum. Í mun til mongu av seinastu undanfarnu árunum, tá ið vit hava leikt í bestu deildini, kunnu vit í ár avgerða alt sjálvir. Undanfarin ár hava vit nevnliga altíð verið noyddir at lata aðrar avgjørt lagnuna fyri okkum!

















# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo

# TIPS 13

## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

Aftur í ár skipa teir báðir Birgar og Janus – sum nú búgva í ávíkavist Keypmannahavn og Aberdeen – fyri kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi". Besti tipparin í einstøku kappingunum vinnur ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 9 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein APEX-flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur eru rættir. Skriva navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í Ítrottarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakastinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hesaferð fært tú at vita í næstu leikskrá.*

*TIPS 13-seðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.*

| 9. UMFAR (set x í rætta rútin) | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur franski landsliðsvenjarin? 1. Michael Platini X. Roger Lemerre 2. Raymond Domenech | | | |
| 2. Hvør er málmansvenjari hjá ÍF? 1. Ovi Joensen X. Steinbjørn í Lambanum 2. Trúgvi | | | |
| 3. Hvør skoraði sigursmálið hjá Italia móti Moldova í HM-undandystinum mikukvøldið? 1. Del Piero X. Totti 2. Aimo Diana | | | |
| 4. Hvat er millumnavnið hjá venjara okkara Petur Mohr? 1. Henryson X. Jákupson 2. Peturson | | | |
| 5. Wayne Rooney er nýggjur í Man. Utd. hópinum. Hvat nummar hevur hann á rygginum? 1. 8 X. 21 X. 28 | | | |
| 6. Danmark spældi 1-1 í Parkini ímóti Ukraina leygardagin 4. september. Hvør skeyt ukrainska málið? 1. Shevchenko X. Andrii Husin 2. Mikhail Starostyak | | | |
| 7. Hvør er toppskjútti í donsku Superligaini? 1. Fredrik Berglund X. Mohamed Zidane 2. Mwape Midi | | | |
| 8. Hvat enskt Premier League felag spælir sínar heimadystir á The Hawthorns 1. Crystal Palace X. Charlton 2. West Bromwich | | | |
| 9. Hvønn valdu áskoðararnir at vera ársins ÍF'ari í fjør? 1. Hanus Eliasen X. Áki Petersen 2. Eyðolvur R.-Petersen | | | |
| 10. Hvør skeyt málið hjá Kroatia í 0-1 sigrinum á Svøríki í HM-undankappingini mikukvøldið 8. september? 1. Marco Babic X. Igor Tudor 2. Darijo Srna | | | |
| 11. Hvør var toppskjútti í EM-kappingini í 1980? 1. Kevin Keegan X. Jan Ceulemans 2. Klaus Allofs | | | |
| 12. Hvør leikari hevur spælt flest A-landsdystir á enska landsliðnum? 1. Peter Shilton X. John Barnes 2. Bryan Robson | | | |
| 13. Hvør danskur fótbóltsleikari hevur skorað flest mál á danska A-landsliðnum? 1. Pauli Jørgensen X. Poul "Tist" Nielsen 2. Ole Madsen | | | |

Føroya Bjór ATLANTIC AIRWAYS

Navn: Bústaður: Telefon:



Til landsdyst í Parkini

# Ikki bara hart á vøllinum!

Rógvi Róin skrivar

Nú ÍF stuðlar hava verið virknir í skjótt eitt ár, mugu vit ásanna, at tað eisini hevur verið sera hart hjá okkum, eins væl og tað hevur verið hart á leikvøllinum. Vit kunnu lýsa tað við at brúka eina av best umtóktu "reality-sjónvarpsrøðum" í løtni, Robinson. Fyrst vóru vit 11, síðani 10, síðani 9 og nú tað gongur ímóti endanum á kappingini eru væl ikki fleiri enn 3-4 sum eru virknir í felagsskapinum. Hetta hevur havt við sær, at vit, sum nú kenna okkum at standa við ábyrgdini, hava brúkt ómetaliga nógva orku at fáa tað, sum vit settu okkum fyri og hava sett í gongd, at bera til.

Áðrenn summarfrítíðina var støðan tann, at vit hildu okkum hava gjørt okkara gerning í ár, og sambært tølunum fóru vit at klára at svara hvørjum sítt uttan at gera tann stóra innsatsin og tey nógvu tiltøkini tað sum eftir varð av árinum. Men vánaligu úrslitini høvdu við sær, at venjarar og eisini vit sjálvir tóku avgerð, at vit máttu styrkja um leikarahópin. Arbeitt varð hart við hesum, og tað endaði við, at avtala varð gjørd við Gunnar og Sylla, sum nú leika við okkum. Umframt tíðina tað tekur at finna røttu leikararnar, er tað eisini kostnaðarmikið at velja slíkar loysnir. Men avgerðin varð tikin: vit vildu gera okkara at tryggja ÍF framhaldandi luttøku í bestu deildini, og so máttu vit eisini fáa til vega neyðuga peningin. Vit halda, at Fuglafjørður eigur at verða umboðaður í bestu fótbóltsdeildini

*Framhald á bls. 8*



*Framhald frá bls. 7*

í landinum, og góðu úrslitini í flogbóltinum eru eisini prógv um, at tað ber til, og at vit eiga góð ítróttarfólk í bygdini.

Støðan beint nú er tann, at felagið ÍF-stuðlar hevur brúk fyri fleiri kreftum at mynda felagið og hjálpa til, um vit skulu halda fram við tí "geisti", sum vit halda, hevur sermerkt felagið. Men beint nú hvíla uppgávurnar á ov fáum herðum, og tað ber ikki til í longdini. Við hesum vóna vit, at tit, sum hava áhuga fyri ítróttarfelagnum, í hesum føri kanska serliga 1. deild monnum, vilja bjóða tykkum fram, at veita eina hjálpandi hond og møguliga eisini mynda nevndina.

Við ynskjum og vónum um, at ÍF-fótbóltur í framtíðini fer at gera seg galdandi í bestu deildini og vit samstundis fara at leggja enn størri orku í at eggja ungum leikarum at spæla fótbólt, og geva teimum enn betur karmar at venja undir og harvið menna sín førleika sum fótbóltsleikarar og persónar sum heild. Takk fyri í ár.

**Rasmus Joensen**

**Málarameistari**

**530 Fuglafjørður**

**Tel. 444 139 - 214139**




Keyp ein tennisbólt

og tú kanst vinna ein Apex-flogferðaseðil

Kostnaður 30,-

Í hálvleikinum skulu bóltarnir tveitast út á vøllin.

Tann bólturin, sum liggur næst miðblettinum, vinnur Apex-flogferðaseðilin.

ATLANTIC AIRWAYS






Persónsvognur úr kr. **313.291,-** v. mvg
Vøruvognur úr kr. **247.571,-** v. mvg

Skaðaumvæling av øllum bilsløgum
á Hjalla FO-180 Hoyvík Tel 311013 www.kollsker.com

**Bilverkstaðið**
v/ Hans J. Kollsker

**Alfa Seafood Spf**

Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tlf. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • Fartlf. +298 22 54 75
E-mail: alfa@post.olivant.fo


Koyrið á ÍF....
..eg stuðli í øllum førum
SMS tel. 31 30 11
MIKLAGARÐUR




Ferðaseðlar www.fonnflog.fo
kring allan knøttin
FONN FLOG
FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo


GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71


Heiðursmerkir
Landsins størsta og besta úrval
Alt innan ítróttarheiðursmerkir, steyp, heiðursmerkir, stakar, plattar...
EILIF ARGE
Klaksvíksvegur · 700 Klaksvík
Tel. 455164 · Fax 457576 · arge-kl@post.olivant.fo


Piddasahandil
og
Ribarhús
listaframsýningar
heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál
føroyskar fløgur
loppumarknaður
- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«
opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00
annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27
hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði




s.pf JAN MOHR

Timbur- snikkara- og betongarbeiði

Tlf. 44 49 49 Fartlf. 21 99 49-21 89 49



BARNAÚTGERÐ
Ciconia

tel 45 65 30
fax 45 65 31

Klaksvíksvegur 63 · boks 163 · Klaksvík




PEUGEOT

Meinhardt Arge


TOYOTA
TOYOTA AVENSIS
AVENSIS
REYNI SERVICE P/F
Vegurin Langi · 188 Hoyvík · Tlf. 353040 · Fax 353041
www.reyniservice.fo · rs@reyniservice.fo


Tilfar til umvælingar,
åbøtur ella annað ...
... spyr fyrst hjá okkum!
Fuglafjarðar Timburhandil
tel. 444 126


FAROE
FISKAVIRKIÐ Í FUGLAFIRÐI


LEVI'S
RED TAB
JEANS
Klæði til hennara,
hansara og børnini
- nu lat undir somu lon
VØRÐSLAN
WEARHOUSE
Í Støð 6, Fuglafjørður, tel 44 47 47

# Rustviðgerð ella forrútar

vit hava loysnina

BE AUTOGLAS

Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • Telefon 444388

Fuglafjarðar Keypssamtøka
Tel 444095 - 444495
Fax 444895 Far 217095

FARPACK

Staravegur 5 • P.O.Box 3099 • FO-110 Tórshavn
Telefon 353000 • Fax 53010
www.farpack.com • e-mail: farpack@farpack.com




WWW.FAROEDIVE.FO
TLF. 218929 / 224224



Alt snikkaraarbeiði verður gjørt.
Øll sløg av vindeygum, hurðum, trappum umframt ymiskar seruppgavur.

Tel 31 71 66 • Fartel 21 71 56
Fax 31 81 31 • Hvalsoyargøta 11

Træsmiðjan GLT



Fjølbroyttur veitari til vinnuna

KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.
Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.





- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar

KJ HYDRAULIK

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com




Reiðari innan frakt- & sandbátar
Krana- og lastvognskoyring
Sandsøla

SANDGREVSTUR

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921



Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358

Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.
Ert tú í iva um mongd, lit ella stødd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.

Brúdleyp Dóp Veitslu
Merkisdag Meistaraheit



th-dam@post.olivant.fo

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00

**Timburmeistari**
Ingi W. á Tórgarði Tlf. 22 61 12
Bøvegur 12, 530 Fuglafjørður

- Alt Timbur-, snikkara- og stoypiarbeiði
- Sethúsabygging
- Virkisbygningar
- Umvælingar

**Dygd = Trygd**

# SAMKEYP

*- tí tað lønar seg*

**NORÐAGØTA**

telefon. . . . . . . . . 44 11 19
skrivstovan . . . . . 44 18 77
fax. . . . . . . . . . . . 44 21 60
fartelefon. . . . . . . 21 03 46

Opið er
manadag - sunnudag kl. 9.00-23.00
p-w@post.olivant.fo

PW






## Skoda Fabia

Frá 132.750

Nógv fyri pengarnar • 10 ára rustgaranti

HONDA NORÐBIL SKODA HYUNDAI

Box 1070 • Oyggjarvegur • Tórshavn • Tel 31 37 07 • Fax 31 08 55





# Góðskan á arbeiðnum altavgerandi

Nýbygging
Umvæling
Ráðgeving
Tekningar
Kostnaðarmetingar





# JLJ-Bygging

**Verkfrøði og húsasmíð**

690 Oyndarfjørður
Tel 21 47 87 & 44 47 87
t-postur: jljuul@post.olivant.fo










Timbur-, betong- og jørðarbeiði

H.K.J. byggivirkið
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56










OROBLU
Seamless Collection
Alt innan húðrøkt frá
LANCÔME
BIOTHERM
Undirklæði frá
FILA
Ninni
Parfumeri • Lingeri
Fuglafjørður • tel 444344


PrimaVera
ja, tað má tað vera!
Pizzaria
PrimaVera
á Kambsdali tlf. 444446


Umvæling og søla av:
BAADER - maskinum
FOMACO - salt sprøjtum
og ymiskum úr rustfríum
stáli.
Eisini selja vit: legur,
POM, bronsu, messing,
boltar og møtrikkar v.m.
P/F Petur Larsen
Bakkavegur - FO-530 Fuglafjørður
tlf. 444174 - fax 444285 - t-post: ol@online.fo
DIMMALÆTTING 341200


Álvaskot
Fysioterapiviðgerðarstova
530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44
Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur


Føroya størsta
úrval av
teldum og tilhoyri
Støkkið inn á gólvið
SPF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - 110 Tórshavn - Tlf. 317620 - Fax 317699 - info@tt.fo - www.tt.fo


HAVSBRÚN
Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Nógv virksemi á leikaramarknaðinum

Nú vit hava verið í "gaminum" í eitt gott ár, kunnu vit bert staðfesta, at tað er nógv virksemi á føroyska leikaramarknaðinum. Sambært nýggju reglugerðini hjá Uefa um leikarasáttmálar, sum eisini sáttmálarnir hjá FSF eru grundaðir á, kann ein sáttmálaleikari fara undir samráðingar við annað felag longu 6 mánaðir áðrenn galdandi sáttmáli fer úr gildi. Tað er gott ár síðani at lógin gom í gildi, og longu nú hava nógvir leikarar, sum er sáttmálabundir, tosað við onnur feløg, sum teir ikki hava sáttmála við. Ella kanska heldur er tað øvugt, at feløgini seta seg í samband við einstøku leikararnar, nú tey vita, at teir kunnu fara undir samráðingar væl áðrenn ein møguligur sáttmáli fer úr gildi. Og vit, sum nú eru í somu støðu, skilja feløgini væl. Øll ynskja at varðveita plássið í deildini og helst eisini verða millum bestu liðini í deildini. Tí vilja øll hava best møguligt útgangsstøði til komandi kappingarár, og har eru leikararnir ein fyritreyt. Og vit vita øll, at øll feløgini vera ikki verðandi í deildini og færri røkka toppinum og harvið einum peningaligum íkasti frá Evropeiska fótbóltssambandinum, UEFA. Peningurin, bestu liðini fáa, er gott íkast í raksturin, serliga um man hevur eydnuna við sær í lutakastinum í evropeisku kappingini.

Ein treyt fyri at luttaka í bestu deildini er, at leikarahópurin er breiður og samstundis hevur eina ávísa styrki, sum er í minsta lagi er nakrir leikarar við royndum og so ein til tveir veruligir profilar, sum bera liðið. Av tí at tað ikki eru so nógvir veruligir profilar, sum kunnu slóða fyri og avgerða dystir, í heimligu kappingini, er eftirspurningurin eftir teimum stórur. Logiskt nokk, er prísurin á hesum leikarum hareftir. Í ár hava fleiri av hesum profilum verið á sama liðnum, og úrslitið er eisini sum væntað frammanundan. – HB hevur nevnliga vunnið bæði steypa- og landskappingina. Teir hava eisini peningaliga orku at tryggja sær hesar, og so hava teir eisini traditiónirnar og góðar og skipaðar umstøður, og tað lokkar eisini bestu leikararnar at velja júst HB sum teirra felag.

Vit eru hinvegin ikki so spennandi fyri hesar leikarar at leika fyri. Tað einasta, sum kanska kann draga, eru pengarnir og teir hava smærru feløg frammanundan torført at fáa nóg mikið av.

Vit í ÍF-stuðlum fingu frá ÍF-nevndini heimildir at samráðast við møguligar nýggjar leikarar. Umframt teir, sum hava sáttmála í dag, vóru aðrir leikarar, sum eru millum teir ónevndu profilarnar omanfyri, men har var einki at gera. – Tað var ikki nóg spennandi fyri hesar at leika við ÍF!

Útgangsstøðið hjá okkum til komandi ár; sjálvsagt treytað av, at vit varðveita plássið í deildini, er tað sama, sum í ár. – Vit vóna at allir leikararnir á liðnum í ár, halda fram, og harafturat fara vit at gera ein innsats at fáa fleiri leikarar at styrkja um hópin, har ímillum eisini ein veruligan profil við royndum. Vit hava tosa við allar sáttmálaleikararnar um komandi ár, men eingin sáttmáli er undirskrivaður. Fyrst skulu vit avgreiða okkara aðalmál, at varðveita plássið í deildini. Vit seta okkara álit á leikararnar, og vóna, at teir gera sítt til, at vit halda fram í 1. deild komandi ár eisini!



# Lítla sølubúðin í ítróttarhúsinum

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús, sjálvt um umstøðurnar eru avmarkaðar. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til nakað eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF´ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

## ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

# 3 13 røtt - Ólavur vann!

Seinast vóru tað tríggir sum høvdu 13 røtt, so ikki kann sigast annað, at menn vita væl. Allir vóru av Larsen slagnum: Ólavur, Teitur og Bjarni. Í lutakasti vann Ólavur sodavatnskassan frá Jolly. Samstundis fekk hann ein lepa í endaliga lutakastið um flogferðina frá Atlantic Airways. Hvussu torførir spurningar eru hesaferð, fæst við at blaða á bls. 6, og svara spurningunum og latið síðani seðilin inn í ítróttarhúsið í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst og tit kunnu eisini vinna.

| | | |
|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur svenski venjarin hjá FC Keypmannahavn? | 1 | Hans Backe |
| 2. Hvør gjørdist toppskjútti í Champions League 2003/04? | X | Fernando Morientes |
| 3. Hvør skeyt fyrra málið í landsdystinum Føroyar - Fraklandi? | X | Ludovic Giuly |
| 4. Hvat nummar hevur Alan Smith á rygginum, tá ið hann fer á vøllin fyri Manchester United? | X | nr. 14 |
| 5. Hvør var málskjúttin hjá ÍF ímóti VB í Fuglafirði? | X | Gunnar |
| 6. Hvar var HM endaspæli í 1974? | 2 | Vestur-Týskland |
| 7. Hvussu eitur Coventry spælarin, ið er nýggjur á føroyska landsliðnum? | 1 | Claus Bech Jørgensen |
| 8. Hvør spælir heimadystir á Estadio Mestalla? | 1 | Valencia |
| 9. Hvussu nógv systkin eigur Trúgvi? | X | 2 systkin |
| 10. Hvussu eitur málverjin hjá Auxerre? | 1 | Fabien Cool |
| 11. Hvør vann Champions League í 93/94? | 2 | AC Milan |
| 12. Tá ið seinni hálvleikur byrjar er Eyðolvur farin í mál og Karstin spælir á miðjuni. Dómarin hevur ikki lagt hetta til merkis! Jákup á Borg skjýtur upp á mál, men Eyðolvur bjargar við hondunum. Hvat ger dómarin nú...? | X | Letur spælið koyra og gevur báðum gula kort tá ið bólturin fer úr spæli í næstu ferð |
| 13. Hvussu nógvar landsdystir hevur heimskendi málverjin Peter Shilton, spælt á enska landsliðnum? | 2 | 125 dystir |

**Starvsnevnd:**
Formaður
Rúni Petersen, 556661
Varaformaður
Sámal Hansen, 212088
Skrivari
Høgni á Lakjuni, 444418
Peningarøkil
Linda Joensen 222180
Tiltakslimur:
Petur við Gjónna

**Fótbóltsdeild**
Tórstein Joensen, 444706
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Guneif Berjastein, 745041
Hildigarð Eliasen, 228771
Atli Petersen, 268295
Ólavur Larsen, 224659
Samskipanarleiðari:
Hildigarð Eliasen, 228771

**Venjarar**
**1. deild**
Petur Mohr, 211955
**3. deild**
Mortan Thomsen, 214404
**4. deild**
Esbern Abrahamsen, 744593
**Old Boys**
Kristian Petersen, 444700
**Unglingar**
Ólavur Larsen, 224659
**Dreingir Ø.**
Ólavur Larsen, 224659
**Smádr. Ø**
Ørvar Jacobsen 268685
**Piltar ½ vøll**
Njál R. Petersen, 444994
**Smápiltar**
Hagbardur Joensen, 212636
og Ørvar Jacobsen, 268685
**Gentur**
Jonn S. Thomsen, 229859 og
Ørvar Jacobsen 268685
**Smágentur**
Ørvar Jacobsen, 268685
**Gentur 10-12**
Sarita Jacobsen, 253383 og
Nikolina Kristiansen, 744060
**Pinkur a-b**
Hanna Poulsen, 262402

Krana- & Lastvognskoyring
Tel. 217 245 - 284 245 - 444 245

**døgg**
.alt innan nýmótans hárviðgerð.

Halla Olsen
tlf. 21 93 79
tlf. 44 55 50

Anja Klemintsdóttir
tlf. 25 83 00

*opið er:*
*mán - frí* 10 - 17
*hósdag* 10 - 19
*leygardag* 10 - 14



Toftavegur 1 · 530 Fuglafjørður · tlf. 44 55 50

BERGFROST
COLD STORAGE

P.O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com

AP BUSSKOYRING
v/ Andreas Poulsen
✆ 22 52 20 - 44 17 20



# Fuglafjaðrar Træsmiðja

við Jóhan Larsen

**Snikkaraarbeiði**
- Vindeygu
- Úthurðar
- Trappur
- Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

DIMMALÆTTING 341200

# SV - TRANSPORT

530 Fuglafjørður
tel. 44 41 77

**Allur flutningur við:**

Lastbilum | Kranabilum | Trailarum
Dumparum | Bingjubilum

# ÁRSINS ÍF-ARI 2004

## Høgni Z bestur

Í dystinum móti EB/Streymi sunnudagin 12. september valdu áskoðararnir málskjúttan Høgna Z at verða besta leikaran á vøllinum. Hetta hevði við sær, at kappingin um at gerast ársins ÍF´ari er hørð undan seinasta heimadystinum í ár. Fyri at verða besti leikarin fær Høgni ein sunnudagsdøgurða fyri tvey á Restaurant Muntra.



### Støðan

| Leikari | Seinast | Íalt |
|---|---|---|
| Karstin | 45 | 194 |
| Áki | 16 | 101 |
| Fritleif | 15 | 115 |
| Bartal | 14 | 32 |
| Gunnar | 13 | 13 |
| Magni | 12 | 100 |
| Rúni | 8 | 29 |

Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst. Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

FA EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Muntra

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen

HARALDSEN
-tætt keypt-

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-B36, 26. september 2004

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst

Nr 1 (5 stig) ______________________

Nr 2 (3 stig) ______________________

Nr 3 (2 stig) ______________________

Veljari / tel: ______________________



## STØÐAN 1. DEILD MENN - 21. SEPTEMBER

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB (m) | 16 | 12 | 3 | 1 | 42 -14 | 39 | 6 - 1 - 0 | 5 - 2 -2 |
| 2 | B36 (s) | 16 | 9 | 3 | 4 | 29 -17 | 30 | 4 - 2 - 3 | 4 - 1 -2 |
| 3 | Skála | 16 | 8 | 3 | 4 | 30 -20 | 27 | 6 - 0 - 2 | 2 - 3 -3 |
| 4 | KÍ | 16 | 5 | 8 | 3 | 22 -20 | 23 | 2 - 5 - 1 | 3 - 3 -2 |
| 5 | EB/Str. | 16 | 6 | 4 | 6 | 26 -22 | 22 | 4 - 2 - 2 | 2 - 2 -4 |
| 6 | GÍ | 16 | 6 | 4 | 6 | 26 -28 | 22 | 2 - 2 - 4 | 4 - 2 -2 |
| 7 | NSÍ | 16 | 6 | 3 | 7 | 24 -22 | 21 | 5 - 1 - 2 | 1 - 2 -5 |
| 8 | VB | 16 | 5 | 4 | 7 | 21 -22 | 19 | 3 - 2 - 3 | 2 - 2 -4 |
| 9 | ÍF (u) | 16 | 3 | 2 | 11 | 21 -46 | 11 | 2 - 2 - 4 | 1 - 0 -7 |
| 10 | B68 | 16 | 2 | 2 | 12 | 15 -45 | 8 | 1 - 1 - 6 | 1 - 1 -6 |

## LEIKARAHAGTØL 1. DEILD MENN 2004

| | Leikari | Min | D | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fróði Poulsen | | | | | | | | |
| 2 | Áki Petersen | 1210 | 15 | 4 | | | | 1 | 101 |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | 70 | 4 | | 4 | | | | 23 |
| 4 | Viggo Johannesen | 1260 | 14 | | | 3 | | | 91 |
| 5 | Roy Róin | 290 | 5 | 5 | | | | | 4 |
| 6 | Bartal Eliasen | 1220 | 14 | | | 1 | 2 | 1 | 59 |
| 7 | Bárður á Lakjuni | 257 | 5 | 1 | 3 | | | | 2 |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 1222 | 14 | 1 | | 5 | 1 | | 115 |
| 9 | Atli Petersen | 195 | 3 | 1 | 1 | | | | 5 |
| 10 | Hanus Eliasen | 1039 | 14 | 4 | 2 | 1 | | 1 | 76 |
| 11 | Eyðolv Petersen | 1122 | 15 | 4 | 2 | 1 | | 1 | 151 |
| 12 | Árni Jóhan Petersen | 737 | 9 | 3 | 1 | | | | 2 |
| 13 | Høgni á Lakjuni | 149 | 3 | 1 | 3 | 2 | | | |
| 14 | Ken Bærentsen | 11 | 1 | | 1 | | | | |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 226 | 9 | 1 | 8 | 1 | | | 20 |
| 16 | Karstin Joensen | 1440 | 16 | | | | | -46 | 222 |
| 17 | Høgni Zachariassen | 1207 | 14 | 1 | 1 | 1 | | 6 | 197 |
| 18 | Rúni Eyðunsson Eltør | 1147 | 13 | 2 | | 3 | 1 | 3 | 42 |
| 19 | Teitur Joensen | 107 | 8 | | 8 | | | | 9 |
| 20 | Jonn Sólheim Thomsen | 29 | 1 | | 1 | | | | |
| 21 | Tórstein Joensen | 206 | 4 | | 3 | | | | |
| 22 | Paul Iburg | 40 | 2 | | 2 | | | | |
| 23 | Jan Guttesen | 355 | 4 | 1 | | 1 | | | 59 |
| 24 | Høgni Madsen | 437 | 6 | 2 | 1 | 3 | | | 4 |
| 25 | Sylla Amed Davy | 395 | 5 | 3 | | 1 | | 1 | 53 |
| 26 | Gunnar G. Nielsen | 239 | 4 | 2 | 1 | | | 2 | 37 |
| 28 | Magni á Lakjuni | 1166 | 14 | 6 | | 1 | | 4 | 120 |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

**Aðrir dystir í 1. deild dag - 17. umfar**
Skála – NSÍ
HB – GÍ
VB – KÍ
B68 – EB/Streymur

**Dystir í 1. deild leygardagin 2. oktober – 18. umfar**
B36 – B68
EB/Streymur – Skála
KÍ – ÍF
GÍ – VB
NSI - HB

**Dystir í 3. deild í dag – 17. umfar**
HB – GÍ
Skála – NSÍ
TB – SÍ
ÍF – Fram
B68 – EB/Streymur

**Málskjúttar 1. deild**

| | |
|---|---|
| Súni Olsen, GÍ | 11 |
| Rógvi Jacobsen, HB | 11 |
| Sonni L. Petersen, EB/Str. | 10 |
| Heine Fernandez, HB | 8 |
| Jacob Bymar, KÍ | 8 |
| Jonhard Fredriksberg, Skála | 8 |
| Bogi Gregersen, Skála | 8 |
| Krzystof Popczynski, GÍ | 7 |
| John Petersen, B36 | 7 |
| Erling Fles, KÍ | 6 |
| Sorin Anghel, EB/Str. | 6 |
| Høgni Zachariassen, ÍF | 6 |
| Anderson, B68 | 6 |

## VERT AT VITA

Nú nærkast endin á eini – fyri okkara viðkomandi – ikki serliga góðari landskapping. Vit hava ikki havt neyðugu eydnuna við okkum, og hava alt ár ligið í botninum. Tí er dysturin í dag ímóti B36 sera týdningarmikil, og kunnu vit í dag avgera lagnuna hjá okkum. Spæla vit javnt ella vinna í dag, samstundi sum B68 tapir á heimavølli ímóti EB/Streymi er 9. plássið tryggja, og skulu vit leika ímóti nr. 2 í 2. deild. Hinvegin, tapa vit í dag, og B68 vinnur, eru vit javnir í stigum, meðan innanhýsis dystirnir tá eru avgerandi, og har hava toftamenn fyrimun. So spenningurin er stórur.

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

| | |
|---|---|
| 1 | Ken Bærentsen |
| 2 | Áki Petersen |
| 3 | Sverri Ellingsgaard |
| 4 | Viggo Johannesen |
| 5 | Bartal Eliasen |
| 7 | Fritleif í Lambanum |
| 9 | Høgni Madsen |
| 10 | Hanus Eliasen |
| 11 | Eyðolvur R.-Petersen (liðsk.) |
| 12 | Gunnar G. Nielsen |
| 13 | Høgni á Lakjuni |
| 14 | |
| 15 | Eyðun Ryggshamar |
| 16 | Karstin Joensen |
| 17 | Høgni Zachariassen |
| 19 | Teitur Joensen |
| 20 | Sylla Amed Davy |
| 28 | Magni á Lakjuni |

**Venjari:**
Petur Mohr
**Hjálparvenjari:**
Tórstein Joensen
**Liðleiðarar:**
Símun Fornagarð
Eilif Eliasen
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

## B36-LIÐIÐ

| | |
|---|---|
| 1 | Magnus Poulsen |
| 2 | Jóhannis Joensen |
| 3 | Allan Mørkøre |
| 4 | Arnbjørn Danielsen |
| 7 | Ronnie Samuelsen |
| 8 | Jens Kr. Hansen |
| 9 | Alex Jose Dos Santos |
| 10 | John Petersen |
| 11 | Bárður Mortansson |
| 15 | Kenneth Jacobsen |
| 16 | Tróndur Vatnhamar |
| 18 | Egil á Bø |
| 19 | Pól Thorsteinsson |
| 20 | Bergur Midjord |
| 21 | Levi Hanssen |
| 22 | Klæmint Matras |
| 23 | Jóhan V. Gunnarsson |
| 24 | Ásbjørn V. Gunnarsson |

**Venjari**
Jóannes Jacobsen
**Hjálparvenjari:**
Magni Mohr
**Liðleiðari**
Sjúrður Norðbúð



**Páll Augustinussen**
**Rúni og Johnleif**

**Petur Larsen**